# Strandferðslan sendir fólk til hús

**Leiðslan á Strandfararskipum Landsins hevur gjørt av at senda fýra fólk til hús. Sambært fíggjarlógini skal stovnurin spara 830.000 krónur í lønum komandi ár, og hetta er høvuðsorsøkin til uppsagnirnar**

UPPSAGNIR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




Leiðslan á Strandfaraskipum Landsins boðaði í tíðindaskrivi týsmorgunin, at stovnurin fer at niðurleggja fýra størv í samband við áløgdu sparingarnar í Fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005.

Stjórin á Strandfaraskipum Landsins, Kristian Davidsen, sigur, at stovnurin hevur fingið boð um at spara 830.000 í lønarkarminum fyri starvsfólk á landi komandi ár.

– Vit eru tíverri noydd at niðurleggja 4 størv í fyrisitingini. Tvey starvsfólk hava fingið boð um, at tey eru søgd úr starvi, og tvey størv verður niðurløgd av náturligum áðum, sigur ein harmur Kristian Davidsen.

Náturligu uppsagnirnar, sum Kristian Davidsen sipar til, stava frá størvum, sum ætlanin ikki er at endurseta. Eitt starvsfólk hjá Strandfararskipum Landsins fór fyri stuttum fór úr starvi, og eingin nýggjur verður settur í hetta starv.

Komandi ár fer eitt av starvsfólkunum á pensjón, og heldur ikki hetta starv er ætlanin at endurseta

## Tillagingar

Spurdur, hvørjar avleiðingar tað hevur fyri Strandfaraskip Landsins, at fýra fólk í fyrisitingini ikki longur verða millum starvsfólkini á stovninum, svarar Kristian Davidsen, at stovnurin verður noyddur tillaga seg til nýggju umstøðurnar.

– Uppsagnirnar merkja, at vit verða noydd at gera tillagingar í mannagongdunum. Vit mugu nú liva uttan hesi starvsfólk, og tí mugu uppgávurnar hjá hesum fólk gerast øðrvísi í framtíðini, greiðir Kristian Davidsen á.

Leiðslan á Strandfaraskipum Landsins hevur lagt eitt uppskot til hoyringar til starvsfólkið um, hvussu hesar tillagingar skulu gerast, og nú skal uppskotið viðgerast millum starvsfólkini

*Hvussu kemur tað at ávirka tænastuna hjá borgaranum, at fýra fólk færra vera í fyrisitingini hjá Strandfaraskipum Landsins?*

– Tað er nærum ómøguligt at siga longu nú, hvør avleiðingin verður, men møguliga kemur tað at ávirka svartíðina hjá okkum, svarar Kristian Davidsen.

# Leikarar úr Vokskabinettinum

**Klaksvíkar Sjónleikarafelag er í farið í gongd við at venja ein leik til heystið. Arbeiðsheitið er Ansa mær eftir Amaliu, og hevur felagið fingið fleiri av teimum eldru leikarunum fram aftur**

SJÓNLEIKUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Leygarkvøldið 23. oktober verður frumframførsla í Atlantis av skemtileikinum Ansa mær eftir Amaliu*

**Klaksvík:**
Í hesum døgum venja leikarar hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag dúgliga nýggja leikin, sum felagið hevur sett sær fyri at framføra hetta heystið. Fleiri av leikarunum hava ofta staðið á palli fyrr fyri sjónleikarafelagið, men tað er nakað síðani.

Millum annað verða leikarar sum Ólavur Klakk, Eliesar í Pálsstovu, Jógvan Brim Joensen og Suni Samuelsen aftur at síggja á pallinum til hendan leikin.

– So sigast kann, at felagið av sonnum hevur verið í Vokskabinettinum eftir leikarum, sigur Rudolf Joensen, sum tekur sær av PR arbeiðinum í sambandi við leikin.

19 leikarar eru við, so talan er um ein stóran leik. Og sum norðoyingum dámar best, er hetta somuleiðis ein skemtileikur.

## Venja úti

Felagið hevur vant leikin í hølunum hjá Føroya Bjór inntil í gjár. Hetta kemst av, at biografur er í Atlantis fleiri kvøld um vikuna, og tá slepst ikki upp á pallin. Men komandi tvær vikurnar verður bert ein filmsýning um kvøldið, og verður seinasta hondin løgd á venjingarnar á pallinum í Atlantis.

Georges Feydave hevur skrivað leikin, og er hetta ikki fyrstu ferð, at felagið spælir ein leik hjá honum. Í 1992 spældu tey skemtileikin, Loppuskriði. Tann leikurin var sera vælumtóktur kring alt landið.

Stílurin hjá Feydave er eitt sindur øðrvísi enn í farsunum, sum felagið eisini hevur spælt eina ørgrynnu av. Talan er um stuttar og skjótar replikkir, har timing er alt.

Tað er kanska ikki so løgið, at Feydave dugdi væl timing, tá hugsað verður um, at maðurin var støddfrøðingur.

Egi Dam leikstjórnar, og hevur hann somuleiðis eisini týtt leikin sjálvur. Leikurin hevur frumframførslu 23. oktober.



# Vala bókaverk um Havnina

MÓTTØKA

Herfyri varð móttøka í Müllers pakkhúsi í Havn í sambandi við at tvey tey fyrstu bindini um søguna hjá Havnini eru komin út. Formaðurin í Mentamálanevndini hjá býráðnum, Heðin Mortensen fegnaðist um bókaverkið og beyð øllum hjartalgia vælkomin í Múllers pakkhús. Hann segði víðari:

– Fyri Tórshavnar býráð skal eg ynskja høvundunum – Kára Jespersen og Jens Paula Nolsøe – hjartaliga til lukku við stórfingna bókaverkinum um Havnar søgu, sum í dag verður lagt fram her í saltkjallaranum í Müllers pakkhúsi.

Talan er um fyrstu tvey bindini, ið røkka frá landnámstíðini til 1816. Og vit kunnu alt fyri eitt staðfesta, at tað er eitt valaverk, ið verður lagt fram.

Eg skal eisini nýta hetta høvi at takka tykkum, sum hava lagt til rættis eina fjølbroytta og áhugaverda framsýning í sambandi við bókaútgávuna.

Sum formaður í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs fegnist eg um, at Müllers pakkhús er karmur um hesa bókaútgávu og framsýning, og ikki er tað sørt, at eg eri glaður og frøist um, at vit í sínari tíð tóku avgerð um at varðveita og gera í stand hetta søguliga hús, ið sum frá líður, kemur at standa sum eitt virðiligt og prýðiligt minni um eina farna tíð.

Hóskiligari umhvørvi um hesa bókaútgávu og framsýning finst valla í býnum, - her andar av søgu og mentan.

At fáa skrivað Havnar søgu hevur leingi verið ynski hjá býráðnum, og við árunum eru komnar fleiri bøkur, sum lýsa partar av hesi søgu. Tað veri seg minningarrit um persónar, fyritøkur, feløg og felagsskapir, siðsøgulig verk, skaldsøgur og endurminningar umframt bøkur, ið lýsa tilburðir, hendingar og broytingar í býnum. Alt munagóð klípi í varðan at varðveita partar av søguliga og mentanarliga virkseminum í Havn.

Men eitt fullfíggjað bókaverk um Havnar søgu hava vit saknað.

Í álitinum um mentan og list í Tórshavnar kommunu, ið ein arbeiðsbólkur, settur av Tórshavnar býráð, lat úr hondum fyri sløkum 4 árum síðani, verður mælt til, at býráðið letur upp í hendurnar á kønum fólki at skriva Havnar søgu frá landnámi til okkara dagar.

Og tað var hesum tilmæli mentamálanevndin fylgdi, tá ið heitt var á Annfinn í Skála, Jógvan Arge, Andras Mortensen, Bárð Jákupsson og Gunnar Hoydal at gera eina ætlan fyri arbeiðið.

**Myndirnar eru frá móttøkuni í Müllers pakkhúsi, tá fyrstu bindini av Havnarsøguni komu út**
*Myndir Eirikur Lindenskov*





Ritstjóranevndin vendi sær til søgufrøðingarnar Kára Jespersen og Jens Paula Nolsøe, og fekk teir áhugaðar at taka á seg uppgávuna.

Vit vistu væl, at tað er ikki løtuverk at skriva eina fullfíggjaða Havnar søgu. Tí hava vit roynt at givið høvundunum so góðar arbeiðsumstøður sum gjørligt. Teir hava havt farloyvi sum lærarar í Hoydølum fyri at arbeiða burturav við útgávuni, alt fyri at hugsavna seg um at skriva og granska í skrivligum keldum og bókmentum um Havnina.

Og nú fyrsti partur av bókarøðini sær dagsins ljós, fegnast vit um hetta stórsligna verk, ið eg veit fer at verða ein fongur hjá øllum søguhugaðum fólki í landinum, tí Jens Pauli og Kári hava m.a. funnið fram nógv forvitnisligt skjala- og myndatilfar - kort, tekningar, skitsur og annað, sum vit ikki áður hava sæð.

Fyri Tórshavnar býráð skal eg nýta hetta høvi at takka tykkum øllum fyri dygdargott arbeiði.

Fyrst og fremst høvundunum, Jens Paula Nolsøe og Kára Jespersen. Ritstjóranevndini fyri teirra leiklut í hesum arbeiði. Jákupi Simonsen deildarleiðara og Bókadeild Føroya Lærarafelags, ið stendur fyri útgávuni. Prent-listarliga arbeiði hava Repro-Z og Ingi Joensen gjørt.

Eg takki starvsfólki á Føroya Fornminnissavni, Tórshavnar Býarsavni, Jónhild Johannessen og Dekostovuni fyri áhugaverdu framsýningina í sambandi við bókaútgávuna. Tað skuldi undrað meg, um ikki nógv fólk fer at vitja Müllers pakkhús komandi dagarnar.

Takk øll tit mongu, sum á einhvønn hátt hava dugnað útgávuni og framsýningini.

Lat meg enda við at siga, at tað skal verða mín vón, at væl verður tikið ímóti fyrstu tveimum bindunum, og at ikki verður helmað í, fyrr enn málið at fullføra verkætlanina er rokkið tí, sum tað so mangan er sagt: fyri at skilja nútíðina, er neyðugt at kenna fortíðina.

Eg ivist ikki í, at nógv forvitnisligt er og fer at koma undan kavi segði Heðin Mortensen, formaður í mentunarnevndini.

